


# Dong rindar ikki skatt av oljuni úr Norðsjónum

**Jan Müller**

24.04.2014 - 17:40

Oljan.fo

Danska oljufelagið Dong Energy, sum staturin eigur meginpartin av, hevur ikki goldið skatt av oljuni, sum felagið pumpaði upp úr Norðsjónum í 2012. Orsøkin er sambært felagnum sjálvum, at tað hevur brúkt so nógvar pengar til íløgur, at eingir pengar eru til at rinda skatt við.

Tað kemur fram í einari sending hjá danska útvarpinum, sum eisini veit at siga, at øll hini feløgini, sum eru virkin í danska partinum av Norðsjónum, hava goldið ríkiskassanum skatt.

Tað elvdi til nógv kjak, ikki minst politiskt, tá amerikanska fíggingarfelagið Goldman Sachs keypti seg inn í Dong Energy í vetur, men alment kom einki fram um, at felagið hevur ikki goldið skatt í áravís av oljuni, sum felagið hevur forvunnið í Norðsjónum, sigur DR.

Dong sigur nú, at felagið hevur ikki havt umstøður til at rinda skatt, tí tað er ikki komið so langt við íløgunum sum hini feløgini í Norðsjónum. Felagið vísir á, at í oljuvinnuni er neyðugt við stórum íløgum í fleiri ár á rað, áðrenn virksemið gevur pengar, sum skulu skattast. Men skatturin kemur, sigur Dong.

-Eitt sindur einfalt ber til at siga, at íløgur í dag geva skatt í morgin. Men tað verður sjálvandi ikki í morgin, men eina ferð í framtíðini, sigur samskiftisstjórin hjá Dong Energy, Karsten Anker Petersen, við danska útvarpið.

Hann vil tó ikki siga, nær Dong fer at rinda skatt av oljuni í Norðsjónum, men hann leggur dent á, at felagið heldur allar skattareglur.